Barnagarðurin á Konmansmýru

# Pedagogur

**Vit søkja eftir 1 Pedagogi**
Søkt verður eftir einum pedagogi 35 tímar um vikuna, at byrja skjótastgjørligt ella eftir nærri avtalu.

Á stovuni eru 17 børn í aldrinum 3-5 ár.
Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur. Børnini eru í aldrinum 3-7 ár.

**Í okkara arbeiði leggja vit dent á:**

- **Trivnaðin**
- **Opinleika**
- **Samarbeiði**

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- Hevur góð samstarvsevni.
- Er røkin, nærlagdur og álítandi.
- Nýhugsandi og ígongdsetandi.
- At tú heldur tað verða spennandi og mennandi.

Løn sambart sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevara–felagið Føroya.

Meiri fæst at vita við at ringja til okkum og tosa við leiðaran Elsebet Bolstad ella varaleiðaran Eyðvør Jensen.
TLF. 317878

Umsókn við avriti av prógvið og møguligum viðmæli skal verða okkum í hendi seinast 16. august 2006
**Barnagarðurin á Konmansmýru**

**Barnagarðurin á Konmansmýru**
Hoyvíksvegur 41 B
FO-100 Tórshavn

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Skeið á Fróðskaparsetri Føroya - heystið 2006

**Próvskeið í føroyskum**

Á skeiðinum lærir tú at nýta málið sum amboð á ein góðan og fjøltáttaðan hátt í arbeiði og gerandislívi og tú fært betri fatan av føroyska málinum.
Skeiðið byrjar á *Føroyamálsdeildini, V. U. Hammarsheimbs gøtu 18, 100 Tórshavn* 11.september og endar við próvtøku 6. desember 2006 (12 vikur).
Undirvísing er mánadagar og mikudagar, báðar dagar kl. 17.15 - 19.30.

Tilrádd fortreyt er føroyskt á miðnámsskúlastigi ella samsvarandi.

Lærari: Lena Reinert

Nágreiniligari upplýsingar og tilmeldingarbløð eru at fáa á setursskrivstovuni. **Tilmeldingarfreistin er sett til 25. august 2006.** Næmingatalið er avmarkað; næmingar verða upptiknir, so hvørt tilmeldingarnar koma inn, til talið er fult.

**Tilmeldingargjaldið er 650 kr.**

Fyri próvtøku í føroyskum gjalda næmingar 300 kr.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.

**Fróðskaparsetur Føroya**
Setursskrivstovan, tlf. 352500
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
110 Tórshavn
www.setur.fo

KJ HYDRAULIK
POWER & MOTION CONTROL

## søkir skrivstovulærling

Vit kunnu bjóða eitt lærupláss til allar uppgávur í eini fyrisiting. Vanliga arbeiðið umfatar millum annað debitor- og kreditorbókhald, tolling, postavgreiðslu, keypfakturering og annars allar tær vanligu uppgávurnar í eini sera dynamiskari fyritøku.

Umsøkjarir skulu hava FHS-prógv ella líknandi miðnámsútbúgving.

Spurningar um starvið kunnu setast Jóhannes Hansen, fíggjarleiðara, á tel. 588815, ella á telduposti jh@kj.fo.

Skriftlig umsøkn, saman við viðkomandi skjølum, skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 7. august 2006.

Send umsøknina til:

KJ Hydraulik PF
Postboks 110
FO 530 Kambsdalur,
ella við telduposti til jh@kj.fo

*KJ er ein fyritøka við serkunnleika innan hydraulik og maskintøkni. Fyritøkan veitir og serviserar útgerð til fiskiídnaðin, alivinnuídnaðin á sjógvi og landi, umframt flutningsvinnuna og byggivinnua. Sum ein av stóru fyritøkunum á maskintekniska øki í Føroyum, veitir KJ eisini útgerð og tænastur til útlendskar marknaðir, eitt nú til Íslands, Skotlands, Hetlands, Grønlands, Danmarkar og Noreg. Í løtuni starvast umleið 60 fólk á deildum okkara á Kambsdali og í Tórshavn.*

# TIMBURMENN TIL DK

Søgt verður eftir timburmonnum at arbeiða í Danmark (Jylland- møguliga Sjælland?)
Best um tað vóru tveir saman, har annar var útbúgvin og hin kann verða sjálvlærdur.

Møguleiki fyri gisting vid arbeidsplássið.

Søgt verður eisini eftir timburmonnum til Sjælland/Amager, men har kann ikki ávísast nøkur gisting.

Ring og hoyr nærri.

**Palja Ejendomsservice**
*palja@ofir.dk*
*004522961852*



# Bilførari

Eitt starv sum bilførari á Viðarnesi er leyst at søkja skjótast til ber.

**Arbeiðsøki:**
Bilførari, koyra tangabil.

**Krøv:**
Stóra koyrikortið. Umsøkjarar við royndum hava fyrimun.

**Arbeiðsstað:**
Tórshavn.

**Løn:**
Smb. sáttmála við Havnar Arbeiðsmannafelag.

**Byrja:**
Skjótast til ber.

Meiri kann fáast at vita um starvið frá Andrias Jacobsen á tlf. 347400, lokal 430.

Shell

# HANDILSLÆRLINGUR TIL THOMAS DAM ÍTRÓTT Í HAVN

Søkt verður eftir lærlingi til ítróttarhandil okkara í Havn at byrja skjótast tilber.
Starvið er fjølbroytt, spennandi og áhugavert fyri tann í dámar væl at umgangast viðskiftafólk.
Tað er eisini møguleiki fyri at luttaka á ítróttarmessu í Danmark.

Lærutíðin við HH er 2 ár, og vi FHS 3 ár. Í hesum tíðarskeiðnum skal næmingurin á skúla í Danmark 3 ferðir.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, dugir væl at umgangast fólk og ikki bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur.

Um tú ert tann rætti kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð við nógvum avbjóðingum, samstundis sum møguleiki er fyri at halda fram í fyritøkuni eftir lokna lærutíð.

Umsóknir við viðmælum verða at senda til:

P/f Thomas Dam Ítróttur
Postmoga 268
FO-110 Tórshavn

Sosialurin 341800

P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTUR · NIELS FINSENSGØTA 5
POSTSMOGA 268 · 110 TÓRSHAVN · TEL 35 53 00

Lesið Sosialin -so eru tit við!